# Jørgen gevst sum uttanríkisráðharri

Fólkaflokkurin minkar um landsstýrismanningina, og samstundis sigur Anfinn Kallsberg farvæl eftir at hava umboðað flokkin í Løgtinginum í góð 30 ár.

Jørgen Niclasen hevur gjørt av at lata landsstýrissessin sum uttanríkisráðharri frá sær longu í dag. Hann fer í staðin at taka við sínum løgtingssessi og gerst samstundis formaður í Løgtingsins fíggjarnevnd í staðin fyri Anfinn Kallsberg.

Jacob Vestergaard tekur við sum nýggjur uttanríkisráðharri. Hann er frammanundan fiskimálaráðharri og fer fram eftir at røkja báðar hesar landsstýrissessirnar.

- Tíðirnar eru jú ikki tær bestu, og samgongan hevur verið noydd at fremja nógvar rasjonaliseringar í almenna geiranum. Og tá vit fremja slíkar rasjonaliseringar, eiga vit eisini at vísa vilja í toppinum. Við hesi umskipanini minka vit landsstýrismanningina hjá flokkinum úr trimum niður í tvey landsstýrisfólk, sigur Jørgen Niclasen.

### Meira tíð til flokkin

- Sjálvur ætli eg nú, umframt løgtings- og fíggjarnevndararbeiðið, at brúka nógv meira orku og tíð til mítt álitisstarv sum formaður í Fólkaflokkinum. At sita í landsstýrinum merkir tíverri, at fjarstøðan til flokkin verður størri, og ferðavirksemið, sum fylgir við uttanríkisráðharrasessinum, hevur sjálvsagt ikki gjørt støðuna betri í so máta. Tí má eg eisini ásanna, at eg ikki havi kunnað røkt mínar uppgávur sum formaður eins væl, og eg fegin vildi, meðan eg havi virkað sum uttanríkisráðharri, sigur Jørgen Niclasen.

- Hetta vil eg fegin bøta um nú, og næstu tíðina vil eg brúka upp á at umleggja leiðsluuppgávurnar, so tað fram eftir verður lættari at leiða flokkin – eisini um eg einaferð skuldu farið aftur í landsstýrið", sigur Jørgen Niclasen.




### Kallsberg sigur farvæl

Jørgen Niclasen tekur yvir formanssessin í fíggjarnevndini eftir Anfinn Kallsberg, ið hevur gjørt av at leggja løgtingssessin frá sær. Í november kundi Anfinn Kallsberg halda 30 ára starvsdag sum løgtingslimur.

Hann var formaður í Fólkaflokkinum frá 1994 til 2007, tá Jørgen Niclasen tók við. Anfinn Kallsberg hevur eisini verið bæði løgmaður, fíggjarmálaráðharri, fiskimálaráðharri og løgtingsformaður, og hann hevur umboðað flokkin eitt valskeið í Fólkatinginum.

# Fólkaflokkurin spælir sjónleik

**DÝRARI FYRI LANDSKASSAN** Tá ið Jørgen Niclasen nú leggur frá sær sum landsstýrismaður, verður tað upp aftur dýrari fyri landskassan




Áki Bertholdsen

- Hetta er tann beri sjónleikur!

Tað er ikki sørt, at Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, er tikin á bóli um avgerðina hjá Fólkaflokkinum um at Jørgen Niclasen skal leggja frá sær sum landsstýrismaður, so at Jákup Vestergaard nú eisini skal umsita uttanríkismál afturat fiskivinnumálum.

Fólkaflokkurin sigur, at ein orsøk til hetta er fyri at spara pening í ovastu fyrisitingini.

- Hetta er politiskt spunasmíð og onki annað, sigur Jóannes Eidesaard í stuttari viðmerking, beint áðrenn blaðið fór til prentingar í morgun.

### Ongin sparing

Hann staðfestir, at tað er ongin sparing í hesum.

- Anfinn Kallsberg skal hava fulla pensjón og Jørgen Niclasen skal hava bíðiløn í eitt hálvt ár.

- Samstundis strongdi Jørgen Niclasen hart á fyri at fáa settan ein aðalstjóra í uttanríkisráðið.

Endar hetta við, at Uttanríkisráðið verður avtikið, skal aðalstjórin hava løn í trý ár.

Jóannes Eidesgaard heldur ikki, at tað er nakað høpi í hesi avgerðini hjá Fólkaflokkinum.

Hertil skal viðmerkjast, at Løgmaður hevur longu góðkent broytingina og hevur loyst Jørgen Niclasen úr embætinum og hevur sett Jacob Vestergaard at umsita uttanríkismál.

- Hetta er rættiliga illa umhugsað, tí tað ber ikki til at hoyggja runt við aðalráðum, soleiðis sum Fólkaflokkurin nú ger.

- Jacob Vestergard hevur nóg mikið at takast við í Fiskimálaráðnum og klárar hann at umsita uttanríkismál eisini, kann tað ikki merkja annað enn, at har er so lítið at gera, at tað átti at verðið niðurlagt.

- Hetta er avgjørt at niðurraðfesta uttanríkisráðið, leggur hann afturat.

Formaður Javnaðarfloksins heldur, at tað hinvegin kundi verið ein meining í at lagt Fiskimálaráðið undir Vinnumálaráðið og Uttanríkisráðið undir løgmansskrivstovuna.

Sjálvur visti Javnaðarflokkurin onki um hesa broytingina fyrrenn eftir klokkan níggju í morgun, ella eftir, at fráboðanin varð kunngjørd.

Annars heldur hann, at tað er skilagott at fækka aðalráðini, men tað skal gerast í samstarvi millum flokkarnar í samgonguni og fakfólk á økinum.